sum ongantíð koma til møti inni. At vitja fólk í teirra heimum hevur verið ein stór signing. Mong, sum ikki koma til møtir, eru fegin um at hava eitt friðarligt prát við eldstaðin.

Í summar hava vit eisini roynt at vitja trúgvandi fólk i fjarskotnum plássum, og søtur er hesin felagsskapur. Í mai og fyrstu helvt av juni vitjaðu vit í Fugloy, Svínoy og Viðoy. Vit høvdu mennandi evangelisk møti í hvørji bygd. Á Borðoynni vitjaði eg tvær bygdir. Í teirri størru, Depil, fekk eg leigað dansistovuna og hevði tvey evangelisk møti. Tað komu ikki nógv fólk. Men tey, eg vitjaði, vóru sera vinarlig. Á slíkum vitjanum ynskja fólk sær Guds orð at lesa. Hetta havi eg ta gleði at geva teimum.

Á Viðareiði fann eg tey trúgvandi lukkulig í Kristusi, og tað gekk framá hjá teimum á Guds vegi. Síðan mítt seinasta brævferu tvey fleiri frá hesum plássi doypt í Havn, ein av hesum var ein 78 ára gamal maður.

Eftir at hava verið eina tíð í Havn og hjálpt til har, fór eg til Suðuroyar, har eg vitjaði fleiri bygdir. Í Hvalba doypti eg eina unga systir, dóttir ein trúgvandi. Her vóru nógv fólk til staðar, so vit høvdu eitt rættiligt evangeliskt møti í hesum sambandi. Á vegnum aftur til Havnar steðgaði eg í Vági, har tað búgva um 800 fólk. Her høvdu vit, haldi eg, størsta útimøti, eg havi sæð í Føroyum. Fólkið lurtaði erliga eftir Guds orði, og aftaná tóku fleiri í hond mína og takkaðu mær fyri at vera komnan. Summir av vinunum í Porkeri vóru til staðar og váttaðu Harrans frelsumegi.

Fyri fimm árum síðani kundi eg ikki fáa innivist í Vági. Nú eru vit vælkomin og vita um fimm trúgvandi har.

Í morgin vóna konan og eg at sleppa vestur til Sørvágs at halda evangelisk møti har.



*Daniel var nógv í Porkeri. Hetta eru tey fyrstu í samkomuni í 1907*

## Napoleon í Dali fórst við Oliviu

Í 1912 er eitt bræv frá Arthur Brend, har hann greiður frá vanlukkuni við "Oliviu", tá Poli í Dali við manning gekk burtur. Hetta var ein dyggur smeitur fyri ta lítllu brøðrasamkomuna, tí Poli var ein av hennara fremstu stuðlum. Tað verður eisini nevnt, at Poli var riddari av Dannebrog. Tað kann vera nevnt, at tað júst í ár eru 100 ár liðin, síðani Poli var við til at stovna Mjólkaforsýningina, hvørs søgu vit fara at koma aftur til.

## Tvey sløg av veiðu

*Síðan skrivar Dollin dagfest 5. Juni 1912:*

Tað hevur gingist væl við fiskarínum, men hetta er eitt vandamikið arbeiði. Longu nú eru fleiri, sum við ótta bíða eftir, at teirra kæru, sum tíðliga á árinum fóru til Íslands, skullu koma aftur.

Nógvir av brøðrunum eru fiskimenn, og Harrin hevur givið stóra signing millum fiskimenn. Umborð á nógvum av hesum sluppum verður orðið boðað. Fiskimenn arbeiða ikki sunnudag, og hetta gevur góðar møguleikar hjá teimum kristnu umborð á sluppunum.

Ein kærur bróður úr Norðoyggjum, sum er skipari á eini slupp, kom aftur seinasta túr við góðari veiðu, og við tveimum av manninginí sum høvdu vitnað um sína umvending. Vissuliga hevði okkara bróður fiskað væl! Má okkara góði Gud geva hesum brøðrum alla ta styrki, sum krevst til hesa tvífaldu veiðu.

Seinast vit vóru í sunnara partin av Suðuroy, vóru vit sera væl eggjað at síggja, hvussu undurfult Gud hevur opnað dyrnar fyri evangeliinum, sum veruliga hava verið afturlatnar.

Í Vági, har tað búgva 800 fólk, hava vit havt møtir úti, tí tað ikki hevur verið møguligt at leiga eitt høli, sjálvt ikki dansistovuna. Men her er gjørdur ein útvegur. Handilsmenninir og onnur í bygdini hava ein klubba við einum væl innrættaðum sali og øðrum rúmum. Vit hava nú fingið møguleika fyri at leiga hesi høli fyri ein sera rímiligan prís.

Summi kvøld var salurin fullur, og tað vísti seg at vera stórur áhugi. Nakrir av limunum í klubbanum komu á møti, og vit trúgva, at eitt varandi arbeiði er byrjað.

Vit sóu eisini, at tey kristnu í Porkeri bera ein kláran vitnisburð fyri Harran. Vit høvdu eina lívgandi tíð saman við teimum, og evangelisku møtini vóru væl vitjað.

## Vánaliga móttøka í Fuglafirði

*Seinni í 1912 skrivar blaðið:*

Danielsen skrivar um vitjanir til nakrar oyggjar. Sera eggjandi møtir hava verið hildin í Suðuroy, serliga á Tvøroyri og her hava verið tekin um signingar. Tey trúgvandi á Viðareiði bóðu um at fáa vitjan, áðrenn fiskimenninir fóru avstað. Tey vaksa í náði og í kunnleika og ein systir varð doypt.

Fýra evangelisk møtir vóru hildin í dansistovuni í Fuglafirði, men har komu ikki nógv fólk. Her er fólkið sera misnøgt um, at tvær ungar kvinnur haðani vóru doyptar í Sørvági. Hesar systrarnar eru nú fluttar heimaftur og kunnu rokna við atsókn. Tað var ein frøði at hitta eina kvinnu í Fuglafirði, sum var umvend á eini vitjan í Havn, har hon hevði verið á møti. Hennara trúarjáttan hevði órógvað familjuna, sum eins og nógv í Føroyum setti barnadóp í staðin fyri trúgv.

Tað vísti seg at vera nógvur áhugi í Søldafirði, har ein mammubeiggi Daniel, sýslumaðurin D. J. Danielsen, opnar hús sítt fyri møtum. Hann er trúgvandi.

*Sigast kann, at var vælkoman ikki so góð í Fuglafirði, so gjørdist hon betri seinni. Her kom jú Victor, systkinabarn Dollan, at búgva við øllum sínum virksemi, og her er nú ein stór samkoma og salur "Siloa".*

Hava roynt at finna fram til nevndu kvinnur. Margretha, dóttir Jógvan og Elsu á Lakjuni var gift við Andreas Samuelsen úr Sørvági. Hetta kundi verið systrar hjá henni.

Um nakar veit nakað meira kundu verið áhugavert at frætt.



*Virksemið hjá D.J. Danielsen á Viðareiði gav úrslit. Hetta er samkoman og nýggi salurin í 1911 ella 1912*

**Næstu ferð**

Komandi partur verður tann seinasti. Tá fara vit eisini at endurgeva nakað av tí, sum fólk uttanfyri Brøðrasamkomuna hildu um Daniel.